## Úr Løg-tinginum



# Promillu-koyring og kolvetnis-skattur

*Broyting í ferðslulógini, kolvetnis-skattalógin og tríggjar grannskoðanir vóru til aðru viðgerðar í tinginum í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Eitt uppskot hjá javnaðartingmanninum, Dan Reinert Petersen, um broyting í løgtingslóg um ferðslu og kolvetnisskattalógin hjá Karsteni Hansen, fíggjarmálaráðharra, vóru til aðru viðgerðar í tinginum í gjár saman við trimum grannskoðanum av almennum roknskapum.

Uppskotið um broyting í løgtingslóg um ferðslu er tingmál nummar 37/1999, og snýr tað seg um at geva teimum, sum eru frádømd koyrirættin vegna rúsdrekka- ella promillukoyring, betri møguleika fyri at fáa koyriættin aftur, um tann dømdi í minst eitt ár frammanundan hevur yvirhildið eina eftiransandi viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Uppskotið hjá Dan Petersen varð lagt fyri tingið 18. januar í ár, og eftir fyrstu viðgerðina 20. januar, varð tað beint í rættarnevnina, ið nú er liðug at viðgera tað. Rættarnevndin mælir samd tinginum til at taka undir við uppskotinum.

Kolvetnisskattalógin er tingmál nummar 49/1999. Hon varð løgd fyri tingið av Karsteni Hansen, fíggjarmálaráðharra, 4. februar í ár, og er hon eitt uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattainntøkur av kolvetnisvirksemi.

Kolvetnisskattalógin varð eftir fyrstu viðgerð 9. februar beint í fíggjarnevndina. Nevndin er nú liðug at viðgera málið, og mælir hon samd til at samtykkja uppskotið.

Almennu roknskapirnir vóru undir fyrstu viðgerðini 17. februar beindir beinleiðis til aðru viðgerðar. Talan er um roknskapirnar fyri 1998 hjá Menningargrunni Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunni og Íleggingargrunninum fyri Føroyar.

# Tveir fyri-spurnigar

*Fyrispurningarnir um ávikavist Skúlan á Trøðni og barnsburðargrunnin skuldu svarast á tingfundinum í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Tvey tey seinastu málini áðrenn framløguna á dagsskránni fyri tingfundin í gjár vóru svar uppá tveir fyrispurningar.

Fyrstu fyrispurningurin var fyrispurningur nummar 100-18/1999, sum Rúna Sivertsen, tingvinna fyri Fólkaflokkin, 25. januar setti Signari á Brúnni, landsstýrismanni í undirvísingar- og mentamálum, um skúlan á Trøðni og Sernámsdepilin.

Seinni fyrispurningurin var fyrispurningur nummar 100-19/1999, sum er Lisbeth L. Petersen, tingkvinna fyri Sambandsflokkin, 25. januar setti Finnboga Arge, landsstýrismanni í arbeiðsmarknaðarmálum, viðvíkjandi barnsburðargrunni.



*Klaksvíkingar, lorvíkingar, fuglfirðingar og gøtufólk kunnu um góðar tvær vikur skrúva útvarpstólið á Rás 2*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Rás 2 fær fatur á fleiri lurtarum

*Rás 2 fer nú at senda til Norðoyggjar og størri part av Eysturoynni, og tað verður gjørt við Norðoya Sparikassa í rygginum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Kappingin millum útvarpsrásirnar verður nú rættiliga flutt út um høvusstaðin.

Rás 2 fer um góðar tvær vikur at senda umvegis ein sendara á Brúnaskarði í Klaksvík, og hesin sendarin fer at hava við sær, at Rás 2 fer at hoyrast í Norðoyggjum Lorvík, Fuglafirði og Gøtu.

Tað er Norðoya Sparikassi, sum nú tryggjar Rás 2 størri sendiøki.

– Hetta fer at vaksa munandi um okkara inntøkugrundarlag, sigur Petur Jacobsen, sum í gjár tók við sum stjóri á Rás 2, eftir at Suni Jacobsen er farin frá.

Partapeningurin í Rás 2 er hækkaður úr 80.000 og upp í 130.000, og ADJ eigur nú størsta partin av partapeninginum.

Rás 2 hevur seinastu mánaðirnar sent útvarpstilfar til miðstaðarøki og Skálafjørðin, men tað hevur alla tíðina verið eitt ynski hjá rásini at víðka um sendiøki.

– Virðið á handilslýsingunum veksur munandi, nú lýsingarnar kunnu hoyrast av tveimum triðingum av føroyingum, og hetta kemur at hava sera stóran týdning fyri okkum framyvir, sigur Petur Jacobsen.

– Vit fáa størri møguleikar at selja lýsingar, nú vinnulívið kann røkka størri fjøld, og vit røkka størri parti av vinnulívinum.

### Komnir á mál

Rás 2 livir av lýsingarinntøkunum, og tí er framtakið í Norðoyggjum og Eysturoynni ein liður í royndini hjá rásini at útvega sær fleiri pengar til at reka rásina fyri.

– Jú fleiri pengar vit fáa inn, jú betri útvarp kunnu vit gera, sigur Petur Jacobsen.

Rás 2 ætlar sær at gera tilfar úr tí økinum, sum teir nú fara at senda til, og stjórin útilokar ikki, at rásin fer at samstarva við lokal, til dømis í Klaksvík, har upptøkustudio longu er, og har áhugin fyri at senda útvarp er til staðar. Men enn er einki ítøkiligt í hesum.

– Hetta liggur alt frammi í tíðini, men vit fáa nú møguleikan at lata til dømis klaksvíkingar senda sítt egna tilfar úr Klaksvík. Tekniskt er einki í vegin við hesum, sigur Petur Jacobsen.

### Helst komnir á mál

Rás 2 skal nú hava endaligu loyvini uppá pláss, men hetta eru alt avgreiðslumál. Radioeftirlitið skal góðkenna, at Rás 2 setir sendara upp á Brúnaskarði, rásin skal hava ein frekvens, og Føroya Tele skal geva loyvi til Rás 2 at brúka eina antennu til at seta sendaran á.

– Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá okkum at kunna senda til Klaksvíkar og størri part av Eysturoynni, og eg eri sera spentur, nú tað verður veruleiki, sigur Petur Jacobsen.

Hann sigur, at í løtuni eru ongar ætlanir um at víðka sendiøki enn meira. Rás 2 hevur onga skyldu til at senda til allar Føroyar, og nú teir røkka tveimum triðingum av fólkinum og størum parti av vinnulívinum, halda teir seg verða komnar langt ávegis – kanska á mál.



*Petur Jacobsen er nýggjur stjóri á Rás 2*

### Sparikassin ger tað gjørligt

Norðoya Sparikassi hevur syrgt fyri, at Rás 2 verður ført at gera í løgu í nýggjan sendara nú.

Sparikassin hevur goldið sendaran, sum nú skal setast upp á Brúnaskarði.

– Tá vit gera ein slíka sponsoravtalu, er tað tí, at vit meta eitt virðið verða í hesum, sigur Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassan.

– Tað kann verða ein fyrimunur fyri okkara virkisøki, um vit fáa eina útvarpsrás afturat, og tað kann eisini metast sum eitt pluss, um fleiri tíðindi og útvarpstilfar annars verður gjørt í okkara øki, sigur hann.

Hann leggur tó dent á, at Sparikassin fer ikki at blanda seg upp í virksemi hjá Rás 2. Teir hava goldið fyri sendaran, og Rás 2 eigur og brúkar hann.

– Vit hava onga skyldu til at gera eina slíka íløgu, og vit hava heldur ikki bundið okkum til nakað, um onkur lokalur hevur hug at fara at senda útvarp. Vit meta frá máli til mál, sigur Gunnar Nolsøe.

Stjórin á Rás 2 roknar við at taka nýggja sendaran í brúk um góðar tvær vikur.



# Kaupthing letur upp í Føroyum

*Íslendska fíggjarfyritøkan Kaupthing hf letur nú upp skrivstovu í Føroyum. Fyritøkan varð stovnað í 1982 og hevur umframt skrivstovuna, sum nú letur upp í Føroyum, eisini skrivstovu í Luxembourg*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í dag gerst trengri á føroyska fíggjarmarknaðinum. Íslendska fíggjarfyritøkan Kaupthing hevur nevniliga gjørt av at venda eygunum móti føroyska fíggjarmarknaðinum.

Johnny Brøgger, sum starvast hjá Kaupthing í Luxembourg, váttar fyri Sosialinum, at teir hava vent eygunum móti Føroyum.

### Sparikassarnir eiga

Kaupthing hf er fyritøka, sum íslendsku sparikassarnir - og teir eru nógvir - stovnaðu í 1982.

Endamálið við fyritøkuni var at reka meklaravirksemi og at stýra langtíðarlikviditetinum hjá sparikassunum.

Hetta mundi gangast væl, tí síðani hevur felagið økt munandi um virksemið.

– Í 1996 stovnaði Kaupthing eina íløgueining í Luxembourg við tí endamálið at gera íløgur í altjóða virðisbrøv, sigur Johnny Brøgger.

Hann vísir á, at tað á henda hátt ber til at samansjóða íløgurnar hjá mongum smáum íleggjarum. Harvið skuldi borið til at fingið størri úrtøku burtur úr íløgunum.

Seinni varð eisini ein íløgugrunnur afturat settur á stovn, sum skuldi umsita peningaognirnar hjá ríkari íslendingum og pensjónsgrunnum.



*Nú íslendska fíggjarfyritøkan Kaupthing letur upp í Føroyum, vera Føroya Banki og sparikassarnir ikki einsamallir á tí marknaðinum*
**savnsmynd**



### Keypsskálin

Sum kunnugt verður arbeitt við at gera ein virðisbrævamarknað í Føroyum og vit spurdu tí Johnny Brøgger um tað var ein orsøk til, at Kaupthing nú vendir nøsini hendavegin.

– Kaupthing hevur verið sera virkin á íslendska marknaðinum bæði í sambandi við privatiseringar og í sambandi við at íslendski keypsskálin varð settur á stovn, sigur Johnny Brøgger og leggur afturat, at teir meta, at gongdin í Føroyum fer at vera ógvuliga lík teirri íslendsku.

– Tí halda vit, at vit hava nakað at geva føroyingum og tað er orsøkin til, at vit nú byrja virksemið í Føroyum, sigur hann.

Eitt av teirra arbeiðsøkjum kann tí hugsast fara at vera at hjálpa fyritøkum, sum ætla at skráseta seg í keypsskálanum tá hann einaferð verður settur á stovn.

### Altjóða spælireglur

Nýggja fíggjarfyritøkan kemur inn á føroyska fíggjarmarknaðin undir somu treytum, sum verandi fyritøkur.

Danskar lógir eru galdandi á økinum, men tær eru gjørdar í samsvari við ES-direktiv, sum leggja ógvuliga stóran dent á tryggleikan hjá íleggjarunum.

Treytirnar eru kortini ikki ókendar fyri íslendingum, tí teir hava lagt sínar reglur heilt upp at reglunum, sum eru galdandi í ES, eisini.

Sosialurin hevur skilt, at stjóri og starvsfólk eru sett í nýggju fíggjarfyritøkuni, men tað frætta vit meira um í morgin.

# Hátíðarhildu tíggju ára dagin

*Nógv fólk var komið saman tá Skála skúli hátiíðarhelt tíggju ára dagin hjá nýggja skúlanum. Næmingarnir undirhildu gestunum og ikki fyrr enn klokkan nærkaðist midnátt var skúlin tómur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað var kanska líka so frægt, at skúlanæmingarnir á Skála høvdu frí fyrradagin. Teir høvdu uttan iva verið nakað linir aftan á tann langa mánadagin, tá skúlin hátíðarhelt tíggju ára dagin fyri at skúlin varð vígdur.



Skipað varð fyri stórum tiltakið í skúlanum mánakvøldið og skúlahøllin var á tremur av fólki.

Væl var lagt til rættis, og allir næmingarnir í skúlanum vóru á ein ella annan hátt við í tiltakinum, sum byrjaði klokkan nítjan.

Yngstu næmingarnir sungu og framførdu leik sum lærararnir høvdu sett saman við teimum, meðan teir eldru sungu og undirhildu við skemti. M. a. vóru fleiri skemtiligir smáleikir á pallinum.

Umframt tað helt Pauli Joensen røðu har hann greiddi frá tíðini hann var lærari á Skála og hann visti at siga frá nógvum forvitnisligum.

Pauli er í tí støðu, at hann hevur verið lærari í øllum skúlunum, sum hava verið á Skála og hann greiddi millum annað frá arbeiðinum at gera nýggja skúlan, sum nú er í brúki.

Umframt tað var eisini ein lítil fimleikaframsýning í skúlahøllini og tað fegnaðust gestirnir um.

Gestirnir sluppu eisini at vera eitt sindur við í tiltakinum, tí umframt at fara upp á gólv, varð eisini sungin onkur felagssangur.

Aftaná framførslurnar og dansin bjóðaði skúlin til ein drekkamunn og ein køkubita.

Sum sagt var stór mannfjøld møtt til tiltakið og væl mundu tey trívast í skúlanum, tí klokkan mundi vera um midnátt áðrenn seinastu gestirnir fóru úr skúlanum aftur.




*Skúlahøllin á Skála var fullsett, tá skúlin hátíðarhelt tíggju ára dagin fyri vígsluni*